Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# Javnaðarflokkurin heilsar Jacob Lindenskov á sjeytiára føðingardegnum



Í gjár, týsdagin 10. juni, fylti Jacob Lindenskov, fyrrverandi løgtingsmaður, landsstýrismaður og fyrrverandi fólkatingsmaður 70 ár.

Jákup, sum er sonur Biritu og Edvard Lindenskov, tók realprógv í 1950. Eftir hetta fór hann á tryggingarsambandið sum lærlingur og seinni gjørdist hann starvsmaður har. Í 1954 fór hann á danskan handilsskúla og arbeiddi síðani á donskum tryggingarfelag eina tíð.

Hann hevur verið sera virkin í fráhaldsrørsluni. Var ein av teimum, sum setti hondbóltsfelagið Kyndil á stovn, og var somuleiðis virkin skribentur í fráhaldsblaðnum Glaðastrok. Á heilt ungum árum byrjaði Jákup at leita sær niðan á prentsmiðjuna á Heygsbreyt, har m. a. Sosialurin varð prentaður, og førdi hetta við sær, at hann eitt skifti í sekstiárunum gjørdist blaðstjóri á Sosialinum, saman við Villa Sørensen, sála. Síðani hevur Sosialurin verið eitt av hjartabørnunum hjá Jákupi. Í dag situr hann sum nevndarlimur í P/F Sosialinum.

Bert 25 ára gamal varð Jákup Lindenskov valdur á ting í 1958. Í hesum umfarinum sat hann sum tingmaður til 1966. Hann fekk tá fleiri álitisstørv litin upp í hendi. M.a. var hann tingsskrivari og umboðaði javnaðarflokkin í fleiri týðandi løgtingsnevndum. Í tveimum umførum hevur Jákup Lindenskov sitið sum løgtingsformaður. Hann hevur eisini umboða javnaðarflokkin í álitisstørvum uttan fyri løgtingið. Eitt nú í nevndini fyri P/F Sosialinum sum nevnt er framman fyri.

Tá Petur Mohr Dam, løgmaður sáli í november 1968 legði árarnar inn, og táverandi varaløgmaður, Kristian Djurhuus, tók við sum løgmaður, var tað heilt náttúrligt, at javnaðarflokkurin skuldi hava tveir landsstýrismenn, og líka náttúrligt var tað, at Jákup Lindenskov skuldi verða annar av teimum. Jákup sat sum landsstýrismaður í samfull 11 ár. Hin landsstýrismaðurin, ið tók við tá, var Villi Sørensen, sáli.

Jákup Lindenskov varð afturvaldur sum løgtingsmaður á valinum í 1970 og sat tá sum tingmaður í umleið 20 ár. Seinni var hann aftur á tingi sum varamaður fyri Atla Dam, meðan hesin sat sum løgmaður. Í 1979, tá Johan Nielsen, sáli valdi ikki at lata seg stilla uppaftur til fólkatingsval, varð Jákup Lindenskov valdur fólkatingsmaður. Jákup sat sum fólkatingsmaður í umleið 10 ár.

Jákup er giftur við Jónu Jacobsen, sum er ættað úr Fuglafirði og eiga tey børnini Elina, Eirik og Biritu.

Mangt annað kundi verið sagt um Jákup. Men lat hetta verða nóg mikið á hesum sinni. Restin verur at bíða til hann rundar tey áttati. Vit - javnaðarflokkurin og Sosialurin - ynskja tær Jákupi hjartaliga tillukku við teimum sjeyti, og vón okkara er, at tú eigur nógv góð ár eftir. Vit ynskja tær og tínum alt tað besta í framtíðini. Eina ferð enn, hjartaliga tillukku við sjeyti ára føðingardegnum.

# Inger Enni 80 ár

Hin 30. mei fylti henda vælkenda konan á Tvøroyri áttati.

Inger varð fødd í Keypmannahavn, pápin var hovmeistari hjá D. F. D. S. og var kendur í Føroyum. Hann doyði, tá Inger var 6 ára gomul.

Í Danmark hitti hon Hjørleif Enni av Tvøroyri. Tað rann saman teirra millum. Tey giftust í 1944. Heim til Føroya fluttu tey tá seinni heimsbardagin var av. Tá fór Hjørleif at starvast í handlinum hjá pápa sínum, Dánjal Jákup Enni, ið ættaður var úr Øravík.

Inger og Hjørleif eiga 3 børn, syninir Tórður og Helgi, sum í dag reka handilin eftir pápan, og síðan Birgir ið hevur ar beitt sum kavari, men seinnu árini er kendur sum skipari á Norðlýsinum. Eisini eiga tey bæði nógv ommu og abbabørn. Eitt langabba- og ommubarn er eisini.

Hetta skuldi alt saman verið bæði gleði og gaman, men so skuldi ikki verða. Bert 32 ára gomul gjørdist Inger sjúk av scelrosu, ein sjúka hon hevur drigist við nú í skjótt 2 mannsaldrar.

Hóast nívandi sjúku, ið helst hevði tikið móti frá teimum flestu, so hevur Inger ótroyttiliga tikið bardagan upp, heldur enn at geva skarvin yvir. Nógvar ferðir hevur hon verið av landinum at søkja sær heilsubót. Eisini hevur hon sum yngri roynt at hildið sjúkini niðri við at vant, t. d. við at svimja; - men tó kunnu tey ið kenna viðurskiftini sanna, at besta heislubótin hevur verið eitt ókúgandi mót, eins og eitt lívsjáttandi ljóst sinnalag, saman við góðum stuðli frá teimum nærmastu. Serliga hevur maðurin, Hjørleif, verið henni hollur stuðul. Men sum hann sjálvur so ofta sigur. "Vit eru framvegis eins góð við hvørt annað sum fyrsta dag"

Hvør ið býr á Tvøroyri, ella kemur higar, kennir ikki býarmyndina við konuni í rullustóli og so ein nakað eldri mann, nú nakað kropin, ið trúfastur rullar konuna , tað verður seg til handils, ella bert fyri at hitta fólk. Og fólk kenna tey bæði nógv.

80 ár verður nevndur kempualdur, henda aldur hevur Inger nátt, ikki tí fortreytirnar hava verið til staðar, men hon er saman við manninum Hjørleif, ið er 87, væl fyri. Hetta takka einum framhaldandi góðum og ljósum sinni.

Vinir tínir frøðast saman við tær og ynskja tær nógv góð ár framyvir.

**Dan**

# Kom við á summarlegu!

Summarið nærkast og harvið eisini allar tær mongu summarlegurnar, sum Heimamissiónin skipar fyri. Og tekningarnar streyma inn.

Í ár skipar Heimamissiónin fyri tveimum summarlegum í Sørvági, einari á Viðareiði, einari í Porkeri, og níggju legum í Nesvík – sjey barnalegum og tveimum ungdómslegum.

Á summarlegu er høvi at møta børnum úr øllum landinum, samstundis sum nógv áhugavert er á skránni. Hvønn dag er bíbliutími, sum í ár er um kongin Dávid. Eisini verða ymisk spøl og kappingar á skránni.

Á øllum leguplássunum eru góðir møguleikar at spæla fótbólt, og fleiri staðir ber eisini til at rógva í bátum. Ítriv er eisini á skránni, og í ítrivinum fara leguluttakaranir at gera sær ein lut, sum tey fáa heim við til minnis um leguna. Umframt hetta verður kanska tíð til onkra áhugaverda náttúruuppliving.

Í løtuni streyma tekningarseðlarnir inn, men tó eru pláss eftir enn. Um tú ætlar tær á summarlegu so skunda tær og tekna teg.

Tekningarfreistin til barnalegurnar er týsdagin 10. juni, og til ungdómslegurnar 10. juli.

Tekningarseðilin er at finna aðrastaðni í blaðnum í dag. Tekningarseðlar finnast eisini á www.mission.fo/ssk



## Dagurin

**11. juni. Barnabas.** Verður fleiri ferðir umtalaður í Ápostlasøguni, men at siga altíð í sambandi við ápostulin Paulus. Var við á fyrstu trúboðanarferðini hjá ápostlinum. Evangelisturin Markus og hann vóru systkinabørn. Halgisøgan sigur, at hann á føðioynni Kýpros varð tikin av jødum og brendur á báli í árinum 62, halda teir. Í fornkirkjuni var hildið, at hann skrivaði Hebrearabrævið.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Leivur á Skála 70 ár



Týsdagin 27. mai fylti Leivur Johannesen í Havn 70 ár. Hann er skálamaður, men hevur búð í Havn ein stóran part av ævi síni.

Leivur fór til Danmarkar at lesa og tók prógv sum verkfrøðingur. Hann arbeiddi í Íslandi í 60-árunum og kom heimaftur umleið 1970 og fekk starv sum verkfrøðingur hjá Tórshavnar Kommunu.

Hann hevur havt eftirlit við nógvum stórarbeiðum hjá kommununi. M.a. hevði hann eftirlit við útbygginigini av Molanum í 1972 og við byggingini av keiini á Sundi í 80-árunum. Eisini hevði hann eftirlitið, tá R.C. Effersøesgøta varð gjørd - fyri at nevna nøkur dømi. Umframt hetta stóð hann fyri asfalteringsarbeiðinum og hevði umsjón við grótbrotinum Undir Varða og á Sundi.

Leivur á Skála var ikki einans starvsmaður hjá kommununi. Sum íðin javnaðarmaður varð hann valdur í Tórshavnar Býráð fyri flokkin í 1972 og var býráðslimur í 20 ár. Í 1992 stillaði hann ikki uppaftur, og sama ár gavst hann sum starvsmaður hjá kommununi.

Tað er ikki sørt, at hann eisini hevur roynt seg sum vinnulívsmann. Saman við Guttormi Djurhuus, Oddi á Skipafelagnum og Óla Mikkelsen var hann við til at fáa aling í lag inni á Kaldbaksfirði.

Leivur er giftur við Tordis Johannesen úr Havn, og tey eiga dóttrina Hallu.

# Aaga N. Olsen
## Trongisvági til minnis

*"Vinir vit vóru tey farnu ár,*
*vinir koma og fara,*
*ei sømist monnum at fella tár,*
*nú tynnist í vinarskarða"*

20. februar í ár andaðist Aage N. Olsen. Hann varð 72 ára gamal.

Ikki gekst Aaga so væl barna og unglingaárini. 5 ára gamal misti hann pápan og 15 ára gamal misti hann móður sína.

Hann varð eftir hetta fostraður upp hjá Eliesar og Hansinu ið búðu oman fyri bedingina. Har hevði hann tað gott. Seinni fór hann í læru á bedingini sum handverkari. Fosturpápin Eliesar, kallaður Eliesar á bedingini, var meistari. Aage fekk eisini hetta tilnavn og varð aldri nevndur annað enn Aage á bedingini.

Undirritaði kom at kenna Aaga á ungum árum og fylgdust vit báðir tað verið seg á bedingina har pápar okkara starvaðust, ella í skúla á Tvøroyri. Eisini spældu vit saman á Trongisvágssandi. Tað var um hetta mundi at Trongisvágur hevði sítt egna fótfóltsfelag, nevnt TGB. Úr hesum felag fóru fleiri seinni til tað størra felagið TB at spæla.

Um tað mundi tá Aage fór í læru á bedingini fór eg til skips, men kortini hildu vit sambandið heilt til tað sísta. Tó skuldi tað vísa seg at vit báðir, í endanum á okkara arbeiðsføra lívið, skuldi vinna til dagsins uppihald hjá sama arbeiðsgevara.

Eftir at hava starvast í nøkur ár í Tórshavn, kom Aage suður aftur at starvast hjá Landsverkfrøðinginum. Hann tók starvið upp eftir Brattaberg sum formaður. Eg havi góð minnir frá hesi seinastu tíð okkara á arbeiðsmarknaðinum saman.

Í øllum lutum var Aage ein álitismaður, samvitskufullur og álítandi. Tað kom ongin afturumaftur, hvørki innan handverk, ella í formannsstarvi hansara. Seinastu árini var heilsan farin at bila, hetta nívdi.

Hóast ikki sama politiska lit, Aage var tjóðveldismaður og eg javnaðarmaður, so var ongantíð ilt okkara millum. Vit vóru vinir til tað seinasta.

Aage var giftur við Annu úr Porkeri. Tey eiga 3 børn: Egil, Anniku og Jan. Eisini eru abbabørnini fleiri. Tað gleddi sum rímuligt Aaga almikið, at børn hansara vóru væl undankomin, hetta og trivnaður teirra gekk hann upp í við lív og sál.

Til seinast fari eg at vísa tykkum, konu, børnum og abbabørnum mína samkendslu og lýsa frið yvir vinmann mín Aaga á bedingini í Trongisvágur.

**Tordenskjold Bech**

# Útoyggjastevnan í Kalsoynni 14. juni

TÍÐINDASKRIV
*Frá Útoyggjafelagnum*



Aftur í ár verður Útoyggjastevna hildin. Í ár eru tað limirnir í Kalsoynni, ið fyriskipa stevnuna, sum verður leygardagin 14. juni.

**Tiltøk verða í allari oynni**
Byrjað verður á Syðradali. Síðani verður farið norður eftir oynni til Mikladals, har Ársaðalfundurin hjá Útoyggjafelagnum verður hildin.

Kl. 14 verður stevnan sett norðuri á Trøllanesi, har Finnbogi Ísakson setur stevnuna.

À Trøllanesi verður konsert við Frændum og Brandur og útfeðr norð á Kall. Aftaná verður farið suðuraftur á oynna til Húsar.

Tað frættist, at nógv útoyggjafólk ætla sær at hittast í Kalsoynni – og Útoyggjafelagið roynir at tilrættaleggja ferðamøguleikar fyri tey.

**Stevnan er fyri øll – øll eru væl komin**
Tiltøkini eru almen og verða fyriskipað av: Útoyggjafelagnum, bygdadeildum felagsins í Kalsoynni og Mikladals Sóknar Fráhaldsfelag MSF.

Ferðaætlan fyri leygardagin, sí lýsing í bløðunum.

**Skráin:**
<u>Fríggjakvøldið 13. juni</u>
Húsar: kl. 20 - 22
Framsýning av gomlum lutum í Bakkahandlinum
20 - 22
Listaframsýning og søla av hondgjørdum lutum í skúlanum

Mikladalur: kl. 19 - 23
Árliga eydnuhjólið hjá MSF
Kaffisøla, pylsugrill, fiskibrunnur v.m.

<u>Leygardagin 14. juni</u>
Syðradalur:
kl. 09-10: Koma til Syðradal, morgundrekka
Kl. 10 -10.30: Asbjørn Lómaklett greiðir frá minnisvarðanum

Mikladalur:
Kl. 11 - 13.45: Ársaðalfundur hjá Útoyggjafelagnum í Avhaldshúsinum við døgurða. (Nýggir limir kunnu tekna seg)

Trøllanes:
Kl. 14 -15: Setanarhald: Finnbogi Ísakson flytur fram røðu og felagssangur
15 -: Konsert við Frændum og Brandi Enni (Atgongumerki 100 kr. tá er íroknað konsert, útferð og tiltøk fyri børn)
Kl. 16 -18: Útferð norður á Kallin
<u>Tiltøk fyri børn</u>
Kl. 15 -18: Sølubúðir við heimagjørdum ísi, kaffi, køkum og heimavirkaðum lutum v.m.

Mikladalur:
Kl. 19.00 - 23.00: Árliga eydnuhjólið hjá MSF
Kaffisøla, fiskibrunnur v.m.

Húsar:
Kl. 18.30 -19.30: Andras Joensen greiður frá Kirkjuni
Kl. 19 -: Tombola, skjótibreyt og søla av smyrjibreyði
Kl. 20 -: Eggjakast og togtogan
Kl. 19 - 22: Framsýning av gomlum lutum í Bakkahandlinum
Kl. 19 - 22: Listaframsýning og søla av hond-gjørdum lutum
Kl. 21-: Dansur við Njál og Mouritz og føroyskur dansur

Broytingar kunnu koma í skránna

# Vinnuni tørvar fólk við millumleiðaraútbúgving

TÍÐINDASKRIV

Ein kanning, ið er gjørd av vinnulívsfólki og umboðum frá Tekniska Skúla í Tórshavn, vísir, at tað er stórur tørvur á fólki við millumleiðaraútbúgving í føroysku vinnuni.

Kanningin er gjørd í samband við, at fyrstu føroysku framleiðslutøkningarnir verða liðugt útbúnir síðst í hesum mánaðinum, og at nøggjur flokkur byrjar í august.

Í kanningini luttóku 40 fyritøkur. Fyritøkurnar vóru tænastufyritøkur, fiskivinnufyritøkur, alifyritøkur, maskinverkstøð, skipasmiðjur, flutningsfyritøkur, bilverkstøð v.m., og vísir kanningin, at tørvurin á vælútbúnum fólki á millumleiðarastøði er stórur í øllum vinnugreinum.

Útbúgvingin til Framleiðslutøkning fer fram á Tekniska Skúla í Tórshavn, og er ein 2 ára útbúgving. Kravið til upptøku er, at umsøkjarin er útbúgvin handverkari, atstøðingur ella hevur miðnáms-skúlaútbúgving (Student, HTX, HIF, HH, HF) ella aðra útbúgving á sama støði.

Fakini í útbúgvingini eru málrættaði til vinnuna og umfata: konstruktiónslæru, tekning (autocad, inventor), automatisering (luft-elstýringar, PLC), virkisfyriskipan (virkisbúskapur, leiðsla og goymslustøring), kunningartøkni, internationalisering, framleiðslumenning v.m.

Útbúgvingin leggur dent á, at tann einstaki arbeiður sjálvstøðugt og hevur førleika til at verða bindilið millum leiðslu og "gólv" í eini vinnufyritøku.

Stutt og greitt, ein skjótur vegur frá skúlabeinki til eitt skapandi starv í vinnulívinum.

## Johnny Joensen 60 ár



Fríggjadagin 6. juni fylti Johnny Joensen í Havn 60 ár. Hann er vestmenningur, sonur Judith Olsen úr Sandavági og Petur Jacobsen úr Vestmanna.

Johnny tók lærarapróg v í Havn í 1967. Hann starvaðist í Nunnuskúlanum 1967-70 og síðani í Vestmanna Skúla. Tvær ferðir hevur hann verið á árskeiði í Danmark, í 1972-73 og 1991-92.

Hann er giftur við Tórunn Patursson, sum er dóttir Morið og Erlend Patursson.